## Vilja linka krøvini

Fleiri føroysk fótbóltsfeløg líða undir, at krøvini fyri at fáa UEFA-loyvisgóðkenning eru ov hørð. Tað er eitt mál, sum føroyska Fótbóltssambandi og fleiri av sambondunum í smærru londunum hava roynt at broytt seinnu árini, men enn hevur hetta ikki eydnast.
- UEFA er í høvuðsheitunum ikki til at vika frá meginregluni um, at øll limalondini skulu liva upp til minstukrøvini, sum sett verða. Og bara nøkur heilt fá undantøk verða givin, segði Óli Holm millum annað í formansfrágreiðingini. Millum undantøkini, sum eru givin, kann nevast, at UEFA hevur góðtikið, at minstatalið av sitiplássum til heimavøll hjá liði í fremstu deildini er minkað úr 10.000 niður í 300!

## Tey smáu møttu ikki

Fram, Undri, NÍF og Royn vóru ikki møtt, tá aðalfundurin hjá FSF varð settur. Uttan iva er hetta ein avleiðing av, at nevndu feløg ikki hava atkvøðurætt á fundinum. Hetta tí tey ikki hava lið í bæði vaksnamanna- og ungdómsfótbólti. Tey trý, Fram, Undri og NÍF, vóru annars millum tey seks feløgini, sum skutu Høgna í Stórustovu upp til forsetavalið í FSF. Heldur ikki SÍF var umboðað á aðalfundinum. Umvegis FS Vágar vóru limir í SÍF tó eisini á fundinum.

# Óli var fyrireikaður

**Hóast hann eftir 25 ár í FSF-nevndini varð stemmaður út leygardagin, so tóktist Óli Holm púrasta avkláraður um hetta, tá vit eftir aðalfundin fingu orðið á hann**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*



*Óli Holm tóktist meira avkláraður enn fleiri av stuðlum hansara, tá aðalfundurin leygardagin valdi nýggjan forseta til føroyska fótbóltsheimin*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

*Nú gjørdist talan enn einaferð um kampval til formanspostin í FSF. Og hesa ferð gjørdist tú akkurát av ov stuttur. Hvørjar tankar renna fram, tá tú stendur í slíkari støðu?*

- Sjálvandi ávirkar tað. Men nú havi eg verið við í so nógv ár, og so veit mann, at slík ting kunnu henda. Og tí er mann sjálvandi fyrireikaður upp á møguleikan. Og eg haldi tað vera týdningarmikið, at tú viðurkennir avgerðina, sum aðalfundurin tekur. Tann dag, tá ein somikið stórur felagsskapur sum FSF ikki viðurkennir demokratisku spælireglurnar, eru vit í øllum førum á skeivari leið.

Fyri tveimum árum síðani – og tað hevur aftur verið ført fram hesaferð – at fjarstøðan millum føroysku feløgini og FSF er vorðin dekan ov long, samstundis sum FSF hevur flutt seg nærri UEFA. Er tað ein trupulleiki, at krøvini eru herd somikið upp á stutta tíð.

- Eg ivist í, hvussu stórur trupulleiki tað er. Tað er givið, at krøvini eru herd, men eg eri ikki samdur í, at fjarstøðan millum FSF og feløgini skal vera økt so nógv. Vit hava havt eina røð av fundum við feløgini, har viðurskiftini støðugt verað umrødd, so tað er eitt sjónarmið, sum eg haldi hvílir á einum rættiliga tunnum botni.

- Hinvegin er tað eisini so, at føroysku feløgini ikki hava megnað at fylgt somikið skjótt við krøvunum, sum Fótbóltssambandið hevur tað. Og tað eru nakrar heilt greiðar orsøkir til. So eg haldi tað vera týdningarmikið, at feløgini støðugt líta frameftir, eins og tað hevur stóran týdning, at tey fáa neyðugu hjálpina frá Fótbóltssambandinum. Tað veit eg eisini, at tey fáa, men treytin er, at feløgini eisini sjálv eru við til at skapa neyðuga grundarlagið fyri hesum.

*At enda Óli. Hevur tú nøkur góð ráð til Høgna í Stórustovu, nú hann setir seg í forsetasessin?*

- Nú er tað ikki mín lutur at skula geva forsetanum góð ráð. Høgni hevur so verið í FSF í tvey ár, og tí kennir hann væl til flestu av viðurskiftunum. Men tað er givið, at skalt tú standa fyri einum somikið stórum felagsskapi, sum føroyskur fótbóltur er. So mást tú vera opin og heiðurligur, og tú mást skilja, at eitt er fyrisiting og eitt er politikkur. Tað má vera greiður skilnaður millum hesi bæði. Og so má hann duga at útdelegera, tí við støddini, sum føroyskur fótbóltur hevur, so ber ikki til at toppstýra, sigur Óli Holm.

## Fyrsti Havnarforsetin

Hóast Fótbóltssambandið næsta ár fer um tey 30 árini, so er tað nú fyrstu ferð, at føroyski fótbóltsbossurin er úr høvuðsstaðnum.

Landafrøðin hevur aloftast havt sína náttúrligu ávirkan á føroyska fótbóltslandslagið, soleiðis at ymsu økini hava havt sína umboðan í nevndini.

Soleiðis er tó ikki heilt í dag. Við at missa Óla Holm misti suðuroyggin sítt umboð, og enn hava Vágar ikki fingið sítt umboð inn fyri Jens Erik Magnussen, sum takkaði fyri seg fyri einum ári síðani.

Hvørja ávirkan hetta ítøkiliga hevur í nevndararbeiðinum, er kanska ilt at siga. Og tað er væl so, at aðalmálið hjá nevndini støðugt er at arbeiða fyri føroyskum fótbólti sum heild og fyri alt landið. Men tað skerst tó ikki burtur, at tað samstundis er ein ávísur tryggleiki fyri økini, at tey øll hava sítt umboð í nevndini.

**-mørk**

### Fakta

**Formenn og forsetar**

Kristian Olsen
Klaksvík
1979-1981

Torleif Sigurðsson
Klaksvík
1981-2002

Dánjal Andreasen
Leirvík
2002-2004

Óli Holm
Vági
2004-2008

Høgni í Stórustovu
Havn
2008-

# Nýggju reglurnar avgjørdu

**Fundarstjórin gjørdi undan forsetavalinum greitt, at stóð tað á jøvnum, so bleiv talan um nýggja atkvøðugreiðslu**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Nýggju reglurnar fyri FSF áseta, at fundarstjórin ger av, hvussu farast skal fram, um tað stendur á jøvnum í eini atkvøðugreiðslu.

Christian Andreasen var fundarstjóri til FSF-aðalfundin, og saman við grannskoðaranum og kontrollantinum, Jógvan Amundson, staðfesti hann, at um tað stóð á jøvnum, so skuldi atkvøðast av nýggjum. Stóð framvegis á jøvnum eftir seinnu atkvøðugreiðsluna, fór formansvalið fram við lutakastið.

Um tað var hetta seinasta – at forsetin skuldi finnast við tilvildarligum lutakasti – sum var orsøkin, er ikki greitt. Men tá atkvøtt varð seinnu ferðina, hevði ein atkvøða skift eigara. Fyrru atkvøðugreiðsluna stóð nevnliga á jøvnum, 9-9, og so tóktist aðalfundurin halda ondini, tá atkvøðurnar vórðu taldar upp seinnu ferðina. 17. atkvøðan, sum tá kom úr posanum, var samstundis tann 10. til Høgna, og so kundi Christian Andreasen staðfesta, at talan verður um forsetaskifti í FSF.

### Gomlu reglurnar

Undan og á aðalfundinum var nakað av orðadrátti um, at nýggju FSF-lógirnar hava kroyst fýra av føroysku feløgunum út á síðulinjuna, tí hesi ikki longur kunnu greiða atkvøðu á aðalfundinum.

Frá fleiri síðum varð eisini gitt, at júst hetta fór at tryggja Óla Holm framhald í sessinum. Og tí er tað kanska lagnunnar speisemi, at ein onnur lógarbroyting bar við sær, at forsetin ikki varð sitandi.

Sambært gamla lógarverkinum skuldi forsetin nevnliga hava ein meiriluta av aðalfundinum ímóti sær, skuldi hann fellast. Og hartil hevði nevndin tá eisini eina atkvøðu.

Slapp nevndin at atkvøða hesaferð, so vildi tann atkvøðan ivaleyst verið til fyrimuns fyri Óla Holm. Og undir øllum umstøðum hevði Óli við fyrru atkvøðugreiðsluna ikki nakran meirilutan ímóti sær.

Tær reglurnar høvdu tó ikki nakran týdning leygardagin. Og tá úrslitið av seinnu atkvøðugreiðsluni stóð greitt, var hetta altso samstundis eitt farvæl til mannin, sum í 25 ár – harav 4 sum formaður – hevur verið partur av nevndararbeiðinum innan FSF.